# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

*- Eg vænti, at vit fáa ein lættari dyst móti Eysturríki. Teir vunnu hóast alt bara 3-1 móti Fraklandi*

*Jógvan Martin Olsen*

# Eg spældi upp á tað



*Eftir dystin var Jákup ein av spælarunum, sum skuldi til doping-kontroll, og tó at hetta tók sína tíð, so slapp hann eisini til hinar spælararnar at enda*

*Mynd: Álvur*

**Jákup á Borg syrgdi fyri, at Sorin Ghionea varð útvístur tíðliga í seinna hálvleiki. – Eg spældi eitt sindur upp á tað, men hann rakti meg, sigur landsliðsleikarin**

FÓTBÓLTUR
Uni Holm Johannesen
uni@sosialurin.fo

- Hann slóð út eftir mær, og rakti meg í andlitið. Eg spældi eitt sindur upp á tað, men í hesum spælinum mást tú gera tær dælt av tílíkum støðum.

Geylið frá Jákupi á Borg hoyrdist um allan Tórsvøll, tá Sorin Ghionea tíðliga í seinna hálvleiki hevndi seg inn á miðvallarin. Úrslitið var reytt kort til rumenan, sum sjálvandi gav føroyska liðnum ein fyrimun.

- Vit kundu kanska byrjað trýstið eitt sindur fyrr. Vit eru vandamiklir seinastu løtuna, tá Christian Høgni Jacobsen varð fluttur fram, og tá Bartal Eliasen varð innskiftur. Men tað var so ikki nógmikið.

Tit eru sera verjukendir í fyrra hálvleiki. Var tað avtalað, ella vóru tit trýstir aftur?

- Tað var avtalað. Aftur í dag riggaði uppleggið væl, og vit klára at taka ferðina úr spælinum. Og tað mugu vit fyrihalda okkum til, sigur hann.

Einu løtuna í seinna hálvleiki lá Jákup á Borg undir liðini á Andrew av Fløtum, sum ætlandi skuldi vera einsamallur framherji. Tað var tó ikki nakað, hann fekk boð um.

- Nei, eg fór niðan sjálvur. Eg var eitt sindur ótolin, men tað hevði ikki nógv upp á seg, staðfestir fryntligi Jákup á Borg, sum samanumtikið stóð seg væl.

# Vil hava meira

**Pætur Dam Jacobsen leikti í gjár sín fyrsta landsdyst, tá hann loysti av Jónas Þór Næs á plássinum sum vongverji í høgru**

FÓTBÓLTUR
*Uni Holm Johannesen*
*uni@sosialurin.fo*

Pætur Dam Jacobsen varð tveittur fyri leyvurnar, tá hann í gjár fekk boðini, at hann var millum teir fyrstu ellivu. Hóast hann í løtum hevði stórar trupulleikar at verja fyri mótstøðumonnunum, so var hann væl nøgdur við sítt egna avrik.

- Eg eri greiður yvir, at eg kundi gjørt okkurt øðrvísi í ymiskum støðum. Men hetta var mín fyrsti landsdystur, og fyrireikingarnir kundu eisini verði betri, nú eg brádliga varð boðsendur.

At spæla landsdyst ímóti Rumenia er sjálvsagt ikki tað sama, sum at spæla í Formuladeildini?

- Nei, langt frá. Vit vóru í verjustøðu allatíðina, og samanumtikið gekk tað eisini væl. Vit vóru bara eitt mál frá einum stórum úrsliti, staðfestir Pætur Dam Jacobsen, sum fer at stríðast fyri, at hetta ikki verður hansara seinasti dystur í landsliðsbúnanum.



*Pætur Dam Jacobsen hevði bara tríggjar venjingar, áðrenn hann varð tveittur inn til sín fyrsta landsdyst*

*Mynd: Álvur*